Vinnunevnd Føroya Løgtings

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo

31. January 2019


# Viðvíkjandi skrivi frá NUMO og Vindrøkt, dagfest 22. januar 2019, um útboðini í Neshaga og Húsahaga

**Vinnukærunevndin staðfesti avgerðirnar hjá myndugleikanum um, at SEV vann útboðini í Neshaga (á Eystnesi) og í Húsahaga. Viðurskiftini í sambandi við, at vindfeløgini í Neshaga og Húsahaga vórðu stovnað broyta einki upp á hetta.**

Sambært skrivi frá NUMO til Vindrøkt, dagfest 22. januar 2019, hevur Vindrøkt biðið NUMO um at gjøgnumganga byggiroknskap, framleiðsluroknskap, metingarfrágreiðing, byrjanarfíggjarstøðu og roknskapirnar fyri løgfrøðiligu eindirnar, sum vindmyllurnar hjá SEV liggja í.

Í skrivinum verður ført fram, "*at kappingarneytar hjá SEV hava ivast í, um útreiðslur liggja eftir í SEV aftaná, at vindmyllurnar eru fluttar í sjálvstøðugar juridiskar eindir.*" NUMO sigur víðari, at harvið hevur talan ikki verið um reella kapping í sambandi við tey vindútboð, sum hava verið.

Nevnda skriv hjá NUMO er handað Løgtingsins Vinnunevnd, uttan at SEV hevur havt møguleika frammanundan at gjørt viðmerkingar til skrivið. SEV metir, at bland er komið í hjá NUMO viðvíkjandi tølunum fyri Eystnes, nýggju myllunum á Vørðuni og upprunaligu Vestas myllurnar ár Vørðuni í Neshaga.

Afturvísingarnar hjá SEV kunnu í stuttum lýsast soleiðis:

1) Tilboðini frá SEV um vindmyllur í ávikavist Neshaga á Eystnesi og Húsahaga eru ikki ávirkað, og harvið er elprísurin óbroyttur sambært tilboðunum
2) SEV hevur hildið sett myndugleikakrøv
3) Bland er í staðsetingunum Eystnes og Vørðan, og harvið er bland í út-rokningunum hjá NUMO
4) Byrjanarfíggjarstøðan fyri Vindfelagið í Neshaga hevði sæð øðrvisi út við 2,1 mió.kr., men hetta ávirkar ikki tilboðsprísin

Vestmanna:
+298 34 68 00

Klaksvík:
+298 34 68 00

Vágur:
+298 34 68 00

5) 2,5 mió.kr. niðurskriving av Vestas vindmyllu skal ikki takast við
6) 1,3 mió.kr. í kostnaði fyri rentu og avskrivng á Vørðuni skal ikki við
7) Vindfelagið hevur átikið sær 4,8 mió.kr. í dýrkandi kostnaði fyri verkætlanina á Eystnesi
8) Grannskoðanarvirkið JANUAR vísir aftur øllum tilsipingum frá NUMO um, at JANUAR ikki skal hava hildið allar siðsemisreglur og óheftni fyri grannskoðarar
9) Elveitingareftirlitið skrivar í telduposti til SEV, at eftirlitið onga orsøk hevur til at gera meiri við ítøkiliga málið viðvíkjandi útboðnum av loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Neshaga.

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo

Omanfyri nevndu punkt eru greinað nærri niðanfyri.



SEV vísir aftur uppáhaldinum, at talan ikki hevur verið um reella kapping í sambandi við tey útboð, sum hava verið.

Partarnir lótu inn tilboð í sambandi við 3 vindmyllur á Eystnesi í Neshaga, og Jarðfeingi (nú ORKA) metti um tilboðini. Niðurstøðan var, at SEV vann útboðið í Neshaga. Vindrøkt kærdi hesa niðurstøðu, men kærumyndugleikin tók undir við niðurstøðuni hjá Jarðfeingi.

Vindrøkt kærdi eisini málið um vindútboðið í Húsahaga, og aftur tá fekk Jarðfeingi viðhald, og staðfest var, at SEV hevði besta tilboðið, harundir greitt betri prís. Í avgerðini sigur Vinnukærunevndin, at orsøkin til greitt betra prísin hjá SEV einamest er at finna í lægra íløgukostnaðinum hjá SEV, sum aftur er grundaður á tilboðið frá veitaranum.

Hesar kærur hava havt við sær stóran kostnað fyri føroyska elbrúkaran, tí arbeiðið var seinkað, umframt at óneyðugar oljuútreiðslur stóðust av seinkingunum.

**Myndugleikakrøv hildin**
Við omanfyri nevnda skrivi sáa NUMO og Vindrøkt iva um mannagongdirnar kring vindútboðini í Neshaga og Húsahaga, og um SEV hevur fylgt útbjóðingarkravinum um at leggja vindmyllulundirnar í sjálvstøðugar løgfrøðiligar eindir. Hesin ivi er ógrundaður, tí SEV hevur í hesum sambandi fylgt settum myndugleikakrøvum.

Orsøkin til, at vindfelagið í Húsahaga og vindfelagið í Neshaga ikki vórðu stovnað beinanvegin, var millum annað áður nevndu kærumál og umrøða við eigararnar hjá SEV, harundir hvørt annar partur enn SEV skuldi kunna eiga ein part av vindfelagnum í Húsahaga. Tað stutta av tí langa er, at hesi vindfeløg vórðu stovnað seinni, og at SEV hevur lokið sett myndugleikakrøv í hesi tilgongd.

**Bland í útrokningum hjá NUMO**

Fyri at skilja málið er neyðugt at vita, at Neshagi fevnir um tvær staðsetingar við vindmyllum, hesar eru ávikavist Eystnes og Vørðan. SEV hevur havt myllur og vindorkuvirksemi á Vørðuni síðan 2005, fyrst við trimum Vestas vindmyllum og seinri við tveimum Enercon myllum.

Tvær av hesum fyrstu Vestas myllunum á Vørðuni fingu størri skaðar í 2012, og í 2012 var íløga gjørd í nýggjar og betur hóskandi Enercon vindmyllur, samstundis sum triðja Vestas vindmyllan varð niðurtikin.

Staðsetingin Vørðan og virksemið á Vørðuni hevur ongantíð verið partur av almennum útboði. Almenna útboðið í Neshaga, sum SEV vann, fevndi um staðsetingina Eystnes. Útrokningar av hesum útboði eiga og skulu ikki blandast saman við virkseminum, sum SEV longu hevði á Vørðuni.

Tá vindorkuvirksemið hjá SEV seinni varð lagt í sjálvstøðugar løgfrøðiligar eindir, var natúrligt at leggja virksemið á Vørðuni saman við virkseminum á Eystnesi í sama partafelag, t.e. Vindfelagið Neshagi.

Av tí at sjálvstøðugu vindfeløgini ikki vórðu stovnað beinanvegin, átók SEV sær at standa fyri arbeiðinum í sambandi við tilboðini í Neshaga (á Eystnesi) og í Húsahaga, og vindmyllurnar vórðu síðani lagdar í sjálvstøðug partafeløg sambært krøvunum frá myndugleikanum. SEV stóð fyri uppseting og rakstri av vindmyllunum á Eystnesi frá 2012 til 2015, og SEV stóð somuleiðis fyri uppseting og rakstri av vindmyllunum í Húsahaga frá 2014 til 2015.

Vindmyllurnar á Vørðuni vóru ikki umfataðar av útboðnum. SEV setti tær upp í staðin fyri gomlu Vestas vindmyllurnar. SEV stóð fyri rakstrinum av Vestas vindmyllunum frá 2005-2012 og fyri nýggju vindmyllunum á Vørðuni frá 2012-2015. Hvørki Vestas vindmyllurnar ella nýggju vindmyllurnar á Vørðuni hava verið fevndar av útboði frá myndugleikans síðu.

Vindfelagið Neshagi og vindfelagið Húsahagi vórðu stovnað 23. desember 2016 við virknaði frá 1. januar 2016 eftir umrøðu við myndugleikar, nevnd, leiðslu og eigarar hjá SEV. Frá 1. januar 2016 var raksturin av vindmyllunum á Eystnesi og vindmyllunum í Húsahaga lagdur í sjálvstøðug vindfeløg. Somuleiðis eru vindmyllurnar á Vørðuni lagdar í vindfelagið Neshagi.

Í sambandi við umleggingina til sjálvstøðug vindfeløg vóru neyðugu løgfrøðiligu og roknskaparligu skjølini gjørd fyri at kunna taka yvir ogn og skuld tilhoyrandi vindmyllunum á Eystnesi. SEV legði sum nevnt eisini vindmyllurnar á Vørðuni í Vindfelagið Neshagi.

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo



**Byrjanarfíggjarstøðan**

Byrjanarfíggjarstøðan hevði sæð øðrvísi út, um felagið varð stovnað beinanvegin í 2012, og arbeiðið at seta myllurnar upp á Eystnesi fór fram í vindfelagnum. Eins og undanfarin ár avskrivaði SEV fram til og við 2013 allar ognir fyri eitt heilt ár í útveganarárinum, hetta óansæð nær á árinum hesar vóru útvegaðar, eins og byggirentur vóru útreiðsluførdar. Samlaðu ognir felagsins høvdu verið nakað størri, um ein hevði valt at ognarføra byggirentu og avskriva 2 mánaðir í staðin fyri 12 mánaðir í útveganarárinum fyri vindmyllurnar á Eystnesi.

Byrjanarfíggjarstøðan 1. januar 2016 fyri ogn og skuld er viðgjørd eftir roknskaparháttinum hjá SEV fyri tíðarskeiðið. Nærri útgreining av hesum eru vístar í skjali 1.

NUMO roknar seg fram til, at 5,9 mió.kr. liggja eftir hjá SEV, men talan kann í mesta lagi vera um 2,1 mió. kr. Munurin millum tær 5,9 mió. kr., sum - NUMO sigur -, liggja eftir hjá SEV í sambandi við útboðið av vindmyllunum á Eystnesi, og tær 2,1 mió. kr., sum SEV vísir á, er lutvíst, at upphæddirnar fyri vindmyllurnar á Vørðuni á 1,3 mió. kr. ikki skulu íroknast í útboðið á Eystnesi. Vindmyllurnar á Vørðuni hava, sum áður nevnt, ongantíð verið partur av nøkrum útboði, tær skulu tí ikki roknast við.

Somuleiðis skal niðurskrivingin á 2,5 mió. kr. fyri Vestas vindmylluna, sum var tikin niður, ikki innroknast í Vindfelagið Neshagi. Her er misskiljing komin í hjá NUMO. Henda niðurskriving skal liggja í SEV, tí niðurskrivingin viðvíkir niðurtiknu mylluni, ið ikki var flutt yvir í vindfelagið, men sum skuldi gerast upp hjá SEV, og tí einki hevur við Vindfelagið Neshagi (ella nakað útboð) at gera. Hetta ávirkar tískil heldur ikki roknskaparliga virðið tann 1. januar 2016.

Talan er sostatt um 2,1 mió. kr., sum kann sigast lógu eftir hjá SEV, tá vindfelagið yvirtók ogn og skuld viðvíkjandi vindmyllunum pr. 1. januar 2016.

Hinvegin skal nevnast, at verkætlanin á Eystnesi gjørdist 4,8 mió. kr. dýrari enn ætlað, og hesi dýrkandi viðurskifti hevur vindfelagið í Neshaga átikið sær við óbroyttum tilboðsprísi sambært tilboðnum.

Spurningurin er so, um ikki nettoávirkanin á vindfelagið heldur er ein meirkostnaður á 2,7 mió.kr. (-2,1 mió.kr. +4,8 mió.kr. ) í mun til samlaða tilboðið.

Tað ávirkar ikki árliga raksturin í mun til prísin, sum var latin í sambandi við tilboðið, at 2,1 mió. kr. ligga eftir hjá SEV. Tað ávirkar hinvegin hvussu nógv samlað er útreiðsluført av avskrivingum og rentu hjá felagnum, tá 15 ára tíðarskeiðið er runnið. Ei heldur ávirkar hetta prísin, SEV hevur bjóðað yvirfyri myndugleikanum í sambandi við útboðið. Hesin er óbroyttur í mun til tilboðið,

Vestmanna:
+298 34 68 00

Klaksvík:
+298 34 68 00

Vágur:
+298 34 68 00

sum var givið, eisini tá 2,1 mió.kr. liggja eftir hjá SEV. Prísurin kundi heldur ikki verið lægri, tí tilboðið innihelt eina roknaða rentu á marknaðarstøði og fullar avskrivingarnar.

Tó kann sigast, at virknaðurin er, at felagið roknskaparliga fær eitt hægri úrslit samanlagt enn væntað, tá 15 ára tíðarskeiðið er runnið.

Umráðandi er at leggja til merkis, at hesi viðurskifti broyta ikki tilboðið frá SEV upp á vindmyllurnar á Eystnesi, sum var latið myndugleikunum, ella viðurskiftini í hesum sambandi, tí í tilboðnum vóru roknaðar rentur á marknaðarstøði og fullar avskrivingar íroknað.

Vindútboðini í Neshaga og Húsahaga vóru tey fyrstu av sínum slag, og tað tók sína tíð, áðrenn øll viðurskifti vóru komin upp á pláss. Vinnur SEV í framtíðini eitt vindorkuútboð, kann eitt sjálvstøðugt vindfelag setast á stovn til endamálið beinanvegin, og harvið kunnu øll viðurskifti hesum viðvíkjandi vera í nýggja felagnum frá byrjan.

NUMO vil eisini vera við, at nærum sama mynstur ger seg galdandi fyri Húsahaga sum fyri Neshaga, og at samlaða upphæddin, ið liggur eftir í SEV, er hægri enn tær 5,9 mió. kr.

Í fyrra lagi kann sigast, at talan ikki er um 5,9 mió. kr. í Neshaga, men um eina minni upphædd, eins og víst á frammanfyri. Í seinna lagi er trupult at taka støðu til og gera viðmerkingar til eitt ikki útgreinað uppáhald viðvíkjandi Húsahaga.

Undir øllum umstøðum er vert at leggja til merkis, at hesi viðurskifti ikki broyta tilboðið frá SEV upp á vindmyllurnar í Húsahaga, sum var latið myndugleikanum. Eins og við útboðnum í Neshaga eru roknaðar rentur á marknaðarstøði og fullar avskrivingar tiknar við í tilboðið.

**Ógrundað ákæra mótvegis grannskoðanini**

NUMO finnst at leiklutinum hjá grannskoðanavirkinum JANUAR og sáar m.a. iva um, hvørt talan er um óheftar metingar av virðunum, sum vindfeløgini eru stovnað við. Í hesum sambandi hevur SEV móttikið skriv frá JANUAR, har allar ákærur frá NUMO verða staðiliga vístar aftur. JANUAR metir harumframt, at tað er eitt álvarsmál at reisa slíkar ákærur. Skrivið frá JANUAR er hjálagt hesum skrivi sum skjal 2.

**Elveitingareftirlitið**

SEV hevur sent skrivið frá Grannskoðarafelagnum NUMO viðvíkjandi útboði av loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Neshaga og Húsahaga, eins og skrivið

SEV
**Elfelagið SEV**
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo



**Vestmanna:**
+298 34 68 00

**Klaksvík:**
+298 34 68 00

**Vágur:**
+298 34 68 00

frá grannskoðarafelagnum JANUAR til Elveitingareftirlitið til kunningar. Somuleiðis hevur SEV sent Elveitingareftirlitinum hetta skriv hjá SEV í málinum til kunningar og viðmerkingar.

Elveitingareftirlitið (ORKA/Umhvørvisstovan) hevur við telduposti tann 30. januar 2019 svarað, at "*Umhvørvisstovan metir ikki, at teir upplýsingar, ið koma fram í nevndu skrivum, geva myndugleikanum orsøk til at gera meiri við ítøkiliga málið viðv. útboðnum av loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Neshaga*". Teldupostirin frá Elveitingareftirlitinum er hjálagdur hesum skrivi sum skjal 3.

At enda skal viðmerkjast, at skrivið frá SEV til Vinnunevnd Føroya Løgtings er sett upp í samráði við grannskoðanarvirkið JANUAR.

Vinarliga heilsan

Elfelagið SEV

Hákun Djurhuus, stjóri

Bogi Bendtsen, deildarstjóri

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo

**Skjal 1:**

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo



Um SEV hevði valt tann roknskaparhátt, sum NUMO vísir á, hevði avleiðingin í stuttum verið, at ognirnar høvdu verið størri við stovnan, og tað hevði havt við sær eitt sindur hægri árligar avskrivingar, ið ikki hava ávirkan á gjaldførið, umframt tilsvarandi hægri lántøku, sum hevði borið við sær hægri rentukostnað í lánitíðarskeiðnum.

Við verandi avskrivingarleisti annars og við teimum lánitreytum, sum eru galdandi ymisku tíðarskeiðini, høvdu roknskapartølini verið broytt soleiðis í 2016, 2017 og í árunum, sum koma:

| 1.000 kr. | 2012-2015 | 2016 | 2017 | 2018-2027 | Íalt |
|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðsluføring av ognarførdari byggirentu | 169,2 | 42,3 | 42,3 | 380,5 | 634,3 |
| Hægri rentu-kostnaður av millumrokning 1) | 246,6 | 65,8 | 42,4 | 481,0 | 835,7 |
| Verri úrslit | 415,8 | 108,1 | 84,7 | 861,5 | 1.470,0 |

1) Um ognarførda rentan og 10 mánaðar avskrivingar verða figgjað yvir millumrokning við SEV. Annar møguleiki er, at SEV hækkaði partapening tilsvarandi. Hetta viðførir, at eingin meirrentukostnaður av millumrokningini skal roknast. Triði møguleikin er ein samantvinning av hesum báðum loysnum, har rentukostnaðurin av millumrokningin so hevði verið lægri.

Talvan vísir, at árliga roknskaparúrslitið 2016 og 2017 er umleið 100 t.kr. verri leypandi, men tað týdningarmesta er, at hetta hevur onga ávirkan á prísin, sum SEV bjóðaði í sambandi við útboðið, og avroknað verður samsvarandi tilboðsprísinum. Ávirkanin á úrslitið kann eisini setast í mun til samlaða úrslitið hjá felagnum, sum var 1,5 mió.kr. í 2016 og 1,7 mió.kr. í 2017.

Høvuðsávirkanin er á materiella støðisogn og langfreistaða skuld vegna hægri útveganarvirði. Orsakað av hægri skuld verður rentuútreiðslan samanlagt 112 t.kr. hægri í 2016 og 2017, og harvið lækkar flutt úrslit í eginognini samsvarandi. Skattur er ikki roknaður av nýggjum.

Umráðandi er at leggja til merkis, at hesi viðurskifti broyta ikki tilboðið frá SEV upp á vindmyllurnar á Eystnesi, sum var latið myndugleikunum, ella viðurskiftini í hesum sambandi, tí í tilboðnum vóru roknaðar rentur á marknaðarstøði og fullar avskrivingar íroknað.

Vestmanna:
+298 34 68 00

Klaksvík:
+298 34 68 00

Vágur:
+298 34 68 00

**Skjal 2:**

Skriv frá Grannskoðaravirkinum JANUAR

**Elfelagið SEV**
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo

**Skjal 3:**

Teldupostur dagfestur 30. januar 2019 frá Elveitingareftirlitinum.

**Elfelagið SEV**
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo



**Vestmanna:**
+298 34 68 00

**Klaksvík:**
+298 34 68 00

**Vágur:**
+298 34 68 00

SKJAL 2

Januar

LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SEV
Landavegur 92
Tórshavn
Att: Hákun Djurhuus

Tórshavn, tann 24. januar 2018

**Viðvíkjandi skrivi frá NUMO dagfest 22. januar 2019**

Í skrivi frá Spf. NUMO, undirskrivað av Bjarna Arnasyni, stjóra og skrásettum grannskoðara. Til Spf. Vindrøkt setur Spf. NUMO spurnartekin við, um P/F Januar hevur lokið siðsemisreglurnar um óheftni í sambandi við ymiskar váttanir á roknskapartilfarið hjá Elfelagnum SEV. Sp/f Vindrøkt hevur víðarilatið skrivið til almennu myndugleikarnar í sambandi viðgerðina av útboðið av loyvum til vindorku.
Slíkar tilsipingar meta vit sera álvarsligar, og hesar kunnu ikki standa ósvaraðar.
Stjórin í Spf. NUMO sipar til metingarfrágreiðing, ið sambært vinnulóggávuni skal gerast, tá feløg verða stovnað við øðrum enn reiðum peningi sum kapitalgrundarlag. Eftir vinnufelagslóggávuni er metingarfrágreiðingin ikki ein fullfíggjað virðisáseting, men kravd til at tryggja, at innskotnu aktivini í minsta lagi hava ásetta virðið, og felagið sostatt reelt hevur ásetta trygdarevni.
Vinnufelagslóggávan ásetir somu gegnisásetingar til metingarfólkini, sum við vanligari grannskoðan, m.a. við beinleiðis tilvísing til §22 í grannskoðanarlóggávuni.
Tá stjórin í Spf. NUMO rekur upp undir, at grannskoðanin hjá SEV skal hava brotið lógarásettu reglurnar um óheftni, er tað tí sjálvsagt høpisleyst.
Bjarni Arnason, stjóri í Spf. NUMO vísir víðari til váttan frá 2015, har grannskoðarin hjá SEV váttar, at ávísar upplýsingar eru úr roknskapi, ið er grannskoðaður uttan fyrivarni ella áherðslu á viðurskifti í roknskapinum.
Soleiðis, sum nevnda skriv er orðað, kundi tað bent á, at grannskoðaðu upplýsingarnar vísa seg at vera skeivar. Hetta er skeivt, og misskiljingin stavar frá, at stjórin í NUMO ikki hevur skilt orðingarnar rætt, og tí brúkar tær í skeivum samanhangi.
Tað er eftir okkara fatan hugstoytt, at góðkendir grannskoðarar grunda misfatan av roknskapartilfari og grannskoðaraváttanum til at undirbyggja skeivar niðurstøður um tað tilfar, ið váttanirnar eru givnar um.

Við heilsan

JANUAR,
løggilt grannskoðanarvirki P/F

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

ÓÐINSHÆDD 13
P.O. BOX 30
FO-110 TÓRSHAVN
FAROE ISLANDS

TEL +298 31 47 00
FAX +298 35 17 01

JANUAR@JANUAR.FO
WWW.JANUAR.FO

Skjal 3

**Bogi Bendtsen**

---

**Fra:** Ari Johanneson <AriJ@us.fo>
**Sendt:** 30. januar 2019 15:15
**Til:** Bogi Bendtsen
**Cc:** Petur Nielsen; Kári Mannbjørn Mortensen
**Emne:** VS: UPPSKOT til skriv til vinnunevndina

SEV

Att.: Bogi Bendtsen, fyrisitingarleiðari

Umhvørvisstovan fekk í telduposti frá SEV, dagfestur 23. januar 2019 kunning um skriv frá grannskoðanarfelagnum NUMO viðv. útboði av loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Neshaga og Húsahaga. Skrivið frá NUMO er adresserað til Sp/f Vindrøkt.

Í telduposti 29. januar 2019 sendir SEV Umhvørvisstovuni til kunningar og viðmerkingar uppskot til svarskriv til NUMO, eins og svarskriv frá grannskoðanarfelagum Januar, dagfest 24. januar 2019, eisini verður sent Umhvørvisstovuni til kunningar.

Sagt verður frá, at Umhvørvisstovan metir ikki, at teir upplýsingar, ið koma fram í nevndu skrivum, geva myndugleikanum orsøk til at gera meira við ítøkiliga málið viðv. útboðnum av loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Neshaga.

Vinarliga/Best regards

Ari Johanneson
Ráðgevi/Adviser

***Orka / Energy Directorate***
***Umhvørvisstovan / The Environment Agency***
*Tel.: +298 282860*
www.us.fo

VERIÐ VARIN: Hesin teldupostur kemur uttani frá til SEV. Ikki trýsta á leinkjur ella opna viðlagdar fílir uttan so, at tú kennir sendara og veit, at innihaldið er trygt.